## Fótbóltur á Ovastevnu



Ikki færri enn tveir fótbóltsdystir verða leygardagin í Nólsoy. Hendan »traditiónin« byrjaði í fjør, og í báðum førum er talan um »teir eldru móti teimum yngru«. Sum tað hevur verið frammi, verður talan um ein tónleikadyst, sum Terji Rasmussen hevur gingið á odda fyri, og í hinum førinum er tað fótbóltsfelagið í Nólsoy, NÍF, við Jan Hansen á odda, ið skipar fyri. NÍF-dysturin verður klokkan 15.00 og tónleikadysturin klokkan 16.00 leygardagin.

## Ikki sita køld

Vanliga verður oljan, ið húsarhaldini í Nólsoy brenna, førd um fjørðin við Sam, og tá tað nú lagaði seg soleiðis, at júst Sam skuldi flyta alt tilfarið til Osastevnu út í oynna, nýtti Shell høvið at flyta tveir tangabilar við olju í goymsluna har úti. Tað er ikki vist, at fólk ganga so høgt upp í húsahita á stevnuni, men nú nýtist so ikki nólsoyingum at sita kaldir á stevnuni



# So nær og tó so ólík

**Randi Frederiksberg, sum seinasta árið er vorðin »hálvur nólsoyingur«, skal seta Ovastevnu í ár, og ætlar í røðuni at taka støði í, hvussu fólk í Havn síggja Nólsoy**

OVASTEVNA
*Leo Poulsen*
*leo@sosialurin.fo*

- Inntil fyri einum ári síðani hevði eg bert verið í Nólsoy eina ferð. Tað var ein skúlaútferð, og tað, sum eg minnist best, er Holið. So tað var nátúrliga tað, sum eg spurdi fyrst eftir, tá eg fyri einum ári síðani fekk til uppgávu at samskipa og seta á stovn eina ferðavinnu í oynni, sigur Randi Frederiksberg, sum í ár skal seta Ovastevnuna.

Og hon er verliga vorðin kend í Nólsoy, tí seinasta árið hevur hon ferðast út í oynna eina ferð um vikuna at hava fundir við áhugaðar nólsoyingar, sum eisini hava sæð ein møguleika í ferðavinnu í oynni, ið av landsstýrimun er útrópt at verða komandi »grøn« oyggj. Henda verkætlan gongur út upp á, at Nólsoy skal gerast sjálvforsýnandi innan orku við varandi orkukeldum.

Randi sigur, at hon, eins og onnur havnarfólk, hava sína ímynd av Nólsoy, ein ímynd, sum als ikki vísir seg at halda stikk, tá alt kemur til alt.

- Nólsoy liggur so tætt við Havnina, men kortini eru vit so ólík, hava heilt hvør sína mentan. Nólsoyingar eru so frammarliga á nógvum økjum innan mentan, bæði hvat tónleiki og leiklist viðvíkur, sigur Randi Frederiksberg, sum starvast sum vinnusamskipari hjá Tórshavnar Kommunu.

Og eitt, sum Randi hevur hoyrt nógv um, og sum hon ikki ætlar skal fara aftur við borðinum í ár, er kabarettin.

- Hana ætli eg mær so avgjørt til. Eg havi hoyrt so nógv um kabarettirnar og skilji á lagnum, at nólsoyingar hava so nógvar dugnaligar sjónleikarar, at hana skal eg síggja, sigur Randi Frederiksberg.

Eftir at hava samstarva við nólsoyingar er Randi eisini bergtikin av tí, ið oyggjabúgvarnir kunnu fáa av skafti upp á eina nátt. Hetta upplivdi hon í sambandi við klárgerðina av Kunningarstovuni.

Tað er undarligt at hugsa sær. Fyri einum ári kendi eg einki til Nólsoy. Í dag kenni eg hvønn krók. Og eg heilsi upp á allar nólsoyingar eg møti í Havnar gøtum. Og so veit eg eisini nú, at Holið er niðurdottið fyri nógvum árum síðani, sigur Randi Frederiksberg, ið gleðir seg ómetaliga nógv til Ovastevnuna, tó at tað av persónligum ávum er eitt sindur avmarkað, hvussu nógv hon kann verða við til í Nólsoy um vikuskiftið.



*Tað verður ógvuliga apropos Randi Frederiksberg, ið skal seta Ovastevnuna í ár*

*Mynd: Jens Kristian Vang*

# Grøna sproytu til láturmusklar

**Ein blanding av royndum og heilt nýggjum kabarettleikarum skal í ár syrgja fyri skemtiligu innsløgunum á Ovastevnu. Tilfarið spennir vítt frá djúpt lokalum til tjóðarligt undirhald. Eins og stevnan hevur eisini kabarettin ment seg**

OVASTEVNA
*Leo Poulsen*
*leo@sosialurin.fo*



*Kabarettfólkið undir venjing mikukvøldið. Frá vinstru: Tanja, Snæbjørn, Ulla, Karlot, Villy, Amanda og Nicolaj*

*Mynd: Leo Poulsen*

Eingin Ovastevna uttan eina kabarett.

Ovastevnukabarettin er næstan líka gomul sum stevnan sjálv. Bert fyrsta árið, sum í veruleikanum var eitt royndarár, var eingin kabarett, men seinastu fjúrtan árinik hevur hon verið eitt av mest týdningarmiklu innsløgunum av øllum.

Og kabarettin sjálv er komin langt síðani fyrstu trilvandi byrjanina. Á trænum var heitið á fyrstu Ovastevnukabarettini í 1994, og tað var bæði heitið á kabarettini og temaið í henni. Eitt træ, sum skuldi ímynda savningarstaðið hjá nólsoyingum, varð lagt á pallin, so var improviserað. Ferdugt. So sum áskoðari kundi tú fara til hvørja sýning, eingin teirra var eins. Men tað hevði sanniliga eisini sína sjarmu.

Við árunum hevur kabarettin tó ment seg frá at vera útilokandi lokalt tilfar til at spenna meiri vítt. Og ikki minst hevur alsamt størri dentur verið lagdur á, at gera hana meiri professionella, skilt á tann hátt, at venjingin nú verður tikin í størsta álvara.

Nú verður vant hvørt kvøld í einar tvær vikur upp undir stevnuna, og so hvørt fríggjakvøldið, og harvið frumsýningin, nærkast, tess longri líða venjingarnar út á kvøldið.

Manningin í ár er ein blanding av royndum og heiltnýggjumkabarettleikarum. Teir royndastu fara á pall í kabaretthøpi fyri nítjindu ferð, teir feskastu fyrstu ferð. Aftur í ár eru tað Snæbjørn Hansen og Karlot Jacobsen, sum standa á odda fyri venjingini.

Í leikskránni gremja leikararnir seg eitt sindur um, at nólsoyingar lítið og einki bítt hava gjørt seinasta árið, men okkurt man kortini vera, tí kabarettin liggur um tey trý korterini í longd.

Og sum nólsoyingar vita, so plagar seinasta sýningin mánakvøld eftir stevnuna at vara nakað væl longri, tí tá er alt tað feskasta – tað sum er hent á stevnuni dagarnar fyri – eisini við.

Tey, sum manna kabarettina í ár, eru Snæbjørn Hansen (hevur verið við átta ferðir áður), Tanja L. Poulsen (8), Nicolaj Falck (7), Karlot Jacobsen (6), Ulla Poulsen (0), Amanda Hansen (0) og Villy Joensen (0).